2025

# Samfelagstilvit



# Samfelagstilvit og umhvørvisábyrgd

Nema er í føroyskum høpi ein stór og umfatandi fyritøka, ið er partur av tí menning, ið fer fram í samfelagnum. Arbeiðið hjá Nema sæst aftur kring landið, tá ið tað snýr seg um samskifti, KT-trygd, tøkniloysnir, umhvørvið og mangt annað.

Við útgangsstøði í ST-málunum fyri burðardyggari menning taka vit ábyrgd og tryggja, at samfelagstilvitið er ein natúrligur partur í okkara virksemi og framburði.
Vit eru framsøkin, seta okkum stór mál og arbeiða alla tíðina við at seta umhvørvið á skrá í øllum, vit gera.

*„Við útgangsstøði í okkara missión vilja vit gjøgnum okkara samfelagstilvit tryggja menning, framburð og kapping á okkara virkisøkjum."*

Til tess at lýsa samfelagstilvitið hjá Nema og umhvørvisligu mannagongdirnar hava vit valt at bólka tær í tveir bólkar: 1. Nema og nærumhvørvið og 2. Náttúruumhvørvið.

Gudny Langgaard, Stjóri



Gudny, stjóri

# Heimsmálini

Heimsmálini hjá ST, eisini nevnd Sustainable Development Goals, eru ein felags altjóða kós fyri burðardygd. Málini vóru samtykt í 2015 og fevna um 17 mál, ið skulu røkkast innan 2030. Endamálið er at tryggja eina framtíð, har menniskju, náttúra og búskapur kunnu mennast uttan at seta jørðina ella komandi ættarlið í vanda.

Málini fevna bæði um umhvørvi, sosial viðurskifti og búskaparliga menning. Hetta merkir m.a. at arbeiða fyri grønari orku, javnstøðu millum kynini, betri útbúgving og heilsu, minni fátækadømi og ábyrgdarfulla nýtslu av tilfeingi.

Fyri Nema hava heimsmálini stóran týdning. Tey geva ein greiðan karm fyri, hvussu vit kunnu gera okkara ítøkiliga íkast til burðardygga menning, og hvussu vit kunnu vísa ábyrgd bæði innan fyri egnan rakstur og í samstarvi við kundar og samstarvsfelagar. Við at knýta samfelagstilvitið at heimsmálunum, gerst tað møguligt at vísa, hvar vit longu gera mun, og hvar vit kunnu seta inn fyri at skapa enn størri virði fyri samfelagið.

Vit hava tikið útgangsstøði í seks av teimum 17 málunum, har vit halda, at vit kunnu gera veruligan mun.




**Javnstøða millum kynini**

Fáa í lag javnstøðu millum kynini, og máttmenna allar kvinnur og gentur.




**Vinna, nýskapan og undirstøðukervi**

Byggja sterk undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan.




**Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla**

Tryggja burðardygg nýtslu- og framleiðslumynstur.




**Veðurlagsátøk**

Sum skjótast seta vit í verk átøk at basa veðurlagsbroytingum og avleiðingum av teimum.




**Lív í havi**

Varðveita og á burðardyggan hátt gagnnýta høvini, allan sjógv og sjófeingi til burðardygga menning.




**Lív á landi**

Verja, endurbøta og virka fyri burðardyggari nýtslu av jarðvistskipanum, á burðardyggan hátt røkja skóg, berjast ímóti oyðimarkarmyndan og steðga og venda landtýningum og steðga lívmargfeldismissi



# 1. Nema og nærumhvørvið

Nema er virkin partur í nærumhvørvinum, tá ið tað snýr seg um tað privata, vinnuna, ítróttafeløg og áhugafeløg av ymiskum slag. Vit eru í føroyskum høpi ein stór fyritøka, og tí er tað eisini okkara ábyrgd at seta sjóneykuna á okkara innanhýsis viðurskifti.
Niðanfyri verður samfelagstilvitið hjá Nema, sum fevnir um fleiri tættir, lýst.

## Nýtt 5G Farnet

Fyri nógvum árum síðan var Nema stigtakari til, at vit skuldu hava eitt felags farnet í Føroyum, og nú er loksins komið á mál. Í 2024 var Huawei farnetið niðurlagt og Farnetið frá Ericsson var tikið í nýtslu. Ericsson er ein álitandi fyritøka, og televeitarar úr londunum rundan um okkum, so sum Svøríki, Noregi og Danmark, nýta eisini kjarnutøknina frá Ericsson til farnet teirra. Tað hevur stóran týdning fyri okkum at nýta trygga og álítandi tøkni og harvið skapa tryggleika fyri allar okkara kundar.
Afturat trygdini eru fleiri fyrimunir eru við einum felags farneti, og hesar fyrimunir hava vit leingi arbeitt fyri.

Við nýggja 5G-netinum hava vit nú:

Eitt munandi betri og skjótari samband um allar Føroyar, ið bøtir um veitaratrygdina og tænastuna sum heild.

Framtíðartryggjað nýtsluna og menningina av talgilda samfelagnum, sum krevur, at alsamt fleiri tól og hentleikar verða knýtt til internetið.

Hópin av nýggjum tænastum, ið koma føroyska samfelagnum til góðar.

Eina skynsamari íløgu, ið vit í felag vilja vera við til at lyfta. Føroysku viðskiftafólkini skulu sostatt ikki longur fíggja tvey farnet.



## Trygdin

Nettrygd er ein grundleggjandi fortreyt fyri, at samfelagið kann virka. Nýggja nettrygdarlógin fer at seta krøv til tær fyritøkur, sum veita samfelagnum kjarnutænastur, har fjarskifti er millum tær.

Hjá Nema vita vit, hvussu týdningarmikið tað er, at sambandið riggar trygt og álítandi. Tí arbeiða vit dagliga við at verja kundar okkara og føroyska samfelagið móti netváðum. Vit byggja okkara trygdararbeiði á altjóða standardin ISO/IEC 27001, og vit endurskoða støðugt okkara skipanir og mannagongdir, so vit altíð eru klár til nýggjar avbjóðingar.

Eisini samstarva vit við Fjarskiftiseftirlitið og Forsvarets Efterretningstjeneste um nettrygd og fyribyrging av netálopum. Vit leggja stóran dent á at vera dagførd í nýggjastu vitanini og tøknini og á tann hátt altíð vera eitt fet frammanfyri møguligar netváðar. Á tann hátt tryggja vit, at kundar okkara og føroyska samfelagið kunnu hava álít á, at bæði samband, fjarskifti, skipanir og hýsingin hjá Nema er trygg, støðug og fyrireikað móti møguligum framtíðar avbjóðingum.

Nema bjóðar øllum fyritøkum at gera eina trygdarkanning, har vit staðfesta møguligar veikleikar í skipanum teirra. Eftir kanningina veita vit tilmæli um, hvussu trygdin kann styrkjast, so feløgini eru so væl fyrireikað, sum til ber, at verja seg móti netváðum.



## Viðskiftafólk

Viðskiftafólkini eru kjarnin í okkara virksemi, og vit stremba altíð eftir at fáa eitt gott samstarv og veita bestu tænastuna. Hetta kemur ikki av sær sjálvum, og nógv tíð og hart arbeiði verða løgd í at fáa tænastuveitingina at vera ein natúrligur partur av øllum tilgongdum/mannagongdum í øllum tænastuliðum. Seinastu árini hava vit gjørt stórar íløgur í tøkni og tænastur og ment flest øll okkara sambond.

Íløgurnar hava verið við til:

At tryggja, at vit svara okkara viðskiftafólkum rættstundis, at eingin dettur burturímillum, og at neyðug kunning er tøk og lætt atkomulig.

At tryggja, at vit svara okkara viðskiftafólkum rættstundis, at eingin dettur burturímillum, og at At allar dátur og viðskiftaupplýsingar eru handfarnar rætt og samsvara við ásettu reglur um dátuvernd og tilhoyrandi góðkenningar, so sum ISAE 3000. Sí meira um okkara persónsdátupolitikk: https://nema.fo/persondatupolitikkur/

At gera regluligar nøgdsemiskanningar, ið eru sera gevandi, og geva viðskiftafólkum høvi at siga sína hugsan. Í 2024 fingu 7.729 viðskiftafólk møguleikan at siga sína hugsan umvegis nøgdsemiskanningar, ið vóru sendar út umvegis teldupost. Harafturat arbeiða vit áhaldandi við at bøta um tænastustigið og møguleikarnar hjá viðskiftafólkunum.

## Kunning og samskifti

Tað er sera umráðandi, at kunning og samskifti við viðskiftafólk er í lagi, men ein støðug menning í innanhýsis kunning og samskifti er neyðug. Somuleiðis er tað okkara ábyrgd sum tøkni- og samskiftisveitari at kunna um stóru menningina, møguleikarnar, vandarnar og trygdina á okkara øki.

Vit leggja orku í at kanna og bøta okkara innan- og uttanhýsis kunning og samskifti.



Átøkini eru millum annað:

At kunna neyðugu viðskiftafólkini rættstundis. Her verður stórur dentur lagdur á at kunna rætta viðkomandi við hóskandi boðum og títtleika, soleiðis at tað ikki er til ampa fyri viðkomandi.

At vit gera tað einfalt og lætt at koma í samband við okkum. Mannagongdir í okkara telefonmóttøku vera javnan kannaðar og lagaðar til, so at viðskiftafólk kunnu fáa nøktandi svar sum skjótast.

At vit leggja stóran dent á at kunna ung um m.a. góðan atburð á netinum. Hetta verður gjørt í samstarvi við eSport.fo og SSP-ráðgevingina, har, ið vit eisini eru høvuðsstuðlar. Hetta er ein ovurstór uppgáva, men vit vilja fegin gera okkara til at røkka ungdóminum. Umframt góðan atburð arbeiða vit støðugt við at kunna allar borgarar um kt-trygd og ráðgeva javnan einstaklingum og vinnuni.

At heimasíðan verður dagførd javnan, so at viðskiftafólk og starvsfólk lættliga kunnu leita sær kunning og vegleiðing.

At Nema regluliga hevur starvsfólkafundir, bæði á virkisstigi og deildarstigi. Lagt verður upp til kjak og at skapa ein pall, har allir partar verða hoyrdir.

At íløgur eru gjørdar til at bøta um innanhýsis kunning við m.a. kunningarskíggjum og kunningarforritum. Hetta gagnar bæði starvsfólkum og viðskiftafólkum við at vísa á, hvat gongur fyri seg, og tað er ein áminning um, hvørjar uppgávur skulu loysast.




## Starvsfólk og arbeiðsumhvørvi

Starvsfólkini á Nema eru tey, ið fáa hjólini á fyritøkuni at mala runt. Tí er tað sum arbeiðsgevari sera umráðandi fyri Nema at skapa fyritreytir fyri einum góðum og mennandi arbeiðsumhvørvi. Til tess at varðveita og savna dugnalig starvsfólk verður stór áherðsla løgd á trivnað, trygd og heilsuna sum heild. Vit eru tilvitað um tilknýtið millum kundatænastu og trivnaðin millum starvsfólkini á arbeiðsplássinum, og tí verður starvsfólkatrivnaðurin á Nema raðfestur sera høgt.

Starvsfólkini hjá Nema hava nógvar starvsfólkafyrimunir, ið eru við til at gera tað áhugavert at starvast her. Vit hava eitt virkið starvfólkaumboð, ið umboðar starvsfólkini og er við til at tryggja, at setanir og sáttmálar eru í lagi. Sum partur av setanartreytunum bjóða vit eisini tryggingar til okkara starvsfólk. Allir hesir fyrimunir eru við til at gera Nema til eitt arbeiðspláss, ið nógv trákkast eftir. Vit uppliva stóran áhuga frá fólki, ið ynskja at starvast hjá okkum.

Vit gera nógv burturúr, so at okkara starvsfólk skulu fáa ymiskar ágóðar afturat lønini. Her verður bæði hugsað um tær vørur og tænastur, ið vit bjóða, og eisini at bjóða starvsfólkunum at vera virkin í arbeiðstíð og frítíð. Vit leggja dent á at skapa felagsskap við at venja saman, spæla paddle og innandura fótbólt, sum bæði styrkir um ta likamligu heilsuna og samanhaldið millum starvsfólkini.

Annað hvørt ár fara vit á starvsfólkaferð uttanlands, har starvsfólkini fáa felags upplivingar, ið styrkja sambondini enn meira. Vit hava eina virkna trivnaðarnevnd, ið javnan savnar øll starvsfólkini og skipar fyri tiltøkum, so vit øll koma at kennast betur. Hetta er serliga aktuelt fyri Nema, av tí vit hava so ymiskar uppgávur og nógvar deildir.

Ein týðandi partur av okkara starvsfólkapolitikki er at bjóða heilsugóðan kost á arbeiðsplássinum. Vit hava egnan kokk, ið syrgir fyri, at starvsfólkini í matarskipanini fáa góðan og sunnan mat, meðan tey eru til arbeiðis.

Á Nema ynskja vit, at tað er stutt frá leiðslu til starvsfólk á gólvinum, og nógv arbeiði verður lagt í at halda frástøðuna so stutta sum møguligt frá báðum síðum. Í gerandisdegnum merkir hetta, at leiðslan er sjónlig millum starvsfólkini, og regluliga verður samskift við deildirnar og deildarleiðarnar, soleiðis at arbeitt verður eftir felagsmálunum.

Vit førleikamenna javnan starvsfólk, so at tey kunnu veita bestu tænastuna og eru kunnað um trygd og onnur viðkomandi viðurskifti.
Vit eru sannførd um, at fáa vit skapt karmarnar og framhaldandi hava áðurnevndu fyritreytir í miðdeplinum, gevur tað okkara starvsfólkum yvirskot í gerandisdegnum, bæði í arbeiðstíð og frítíð.

## Eitt arbeiðspláss fyri øll

Hjá Nema síggja vit starvsfólkini sum okkara størstu styrki. Vit vita, at eitt arbeiðspláss við rúmi fyri ymiskleika og javnstøðu ikki bara er rættvíst – tað skapar eisini betri trivnað, sterkari samstarv og størri nýskapan. Tí arbeiða vit miðvíst við at tryggja, at øll starvsfólk kenna seg virðismett og hava somu møguleikar at mennast.

Fyri okkum er tað týdningarmikið, at javnstøða og rúm fyri ymiskleika eru ein natúrligur partur av gerandisdegnum. Hjá Nema fáa menn og kvinnur javnbjóðis møguleikar til útbúgving og menning. Soleiðis byggja vit eina sterka og fjøltáttaða heild, sum gagnar bæði starvsfólkum, kundum og felagnum sum heild.

Úrslit síggjast ikki einans í tølum, men eisini í ymiskum førleikum og sjónarmiðum. Søguliga hava mannfólk verið í meiriluta í tøknivinnuni, og sama lutfall er galdandi í dag. Hjá Nema ynskja vit tilgongd av konufólki. Hetta kemur ikki av sær sjálvum, men krevur, at okkara hugburður og tilvit frá leiðsluni um at seta fleiri kvinnur í starv verður raðfest.

Vit ynskja áhaldandi at hava ymiskleika í nevndini, og at nevndin raðfestir nevndararbeiðið. Málið í 2028 er, at ≥25% av nevndarlimunum eru kvinnur. Hetta kann røkkast við, at nevndin verður víðkað við einari kvinnu.

| Starvsfólk 2024 | Starvsfólk 2024 | Leiðsla 2024 | Leiðsla 2024 |
|---|---|---|---|
| Mannfólk | Konufólk | Mannfólk | Konufólk |
| 75 % | 25 % | 85 % | 15 % |

## Lesandi og arbeiðsmøguleikar

Eitt av okkara málum er at kveikja áhugan á okkara virkisøkjum, ið er hornasteinurin og ein fyritreyt fyri at menna og bøta um førleikastigið Hjá Nema og á føroyska marknaðinum. Tørvurin á nýggjari og góðari vitan er ógvuliga stórur, men Nema rúmar øllum fakbólkum og førleikum.



Tí arbeiða vit javnan við:

- At vera virkin millum lesandi í Føroyum og uttanlands.
- At samstarva bæði tá ið tað snýr seg um starvslestur og at skriva uppgávur.
- At halda siðvenjuna og við jøvnum millumbilum seta lærlingar í starv.
- At rúma fólkum við avmarkaðum arbeiðsførleikum.

## Stuðulspolitikkur

Sum fyritøka fevnir Nema víða, og tað er okkara ábyrgd at vera tilvitað um, hvussu vit ávirka samfelagið og umhvørvið. Vit eru forvitin at fylgja við, hvat rørir seg í samfelagnum, og vit vilja fegin eggja einstaklingum, áhugabólkum og felagsskapum við stuðli og skapa karmar fyri ungar spírar, har teirra hugskot og gransking verða stimbrað og ment.

Nema leggur tó serligan dent á at stuðla verkætlanum, sum eru viðkomandi fyri virksemið hjá Nema. Fyri Nema er stuðulsskipanin ein íløga í verkætlanir, sum samsvara við endamálsorðingina hjá Nema og harafturat ein møguleiki at fáa djúpri innlit í tað, sum rørir seg í samfelagnum, serliga á virkisøkinum hjá Nema.

Seráhugamálini eru verkætlanir, sum hava hesar eginleikar:

- At kveikja áhuga fyri og leggja dent á forritan.
- At upplýsa um og varpa ljós á atburð á netinum, bæði fyrimunir og vansar við internetnýtslu.
- Virksemi ella gransking, sum er viðkomandi fyri tøkni og trygd á netinum.

Hóast Nema hevur ávís seráhugamál, er Nema sjónligt í samfelagnum og stuðlar m.a.:

- Ítrótti.
- Útgávum.
- Verkætlanum.
- Vælgerandi felagsskapum, so sum Barnabata, Bláa krossi, Reyða krossi og Renn fyri lívi.

**Stuðul**
2024
**500.000 kr.**
Í 2024 læt Nema á leið 500.000 kr. sum stuðul til nevndu endamál.

Hvørt ár skipar SSP fyri tryggari internetdøgum, ið hevur til endamáls at læra børn, ið ganga á hádeild á øllum skúlum í Føroyum, hvussu ein ferðast á netinum. Hetta hevur Nema í fleiri ár verið partur av. Tað er sera týdningarmikið fyri okkum sum fjarskiftisfyritøka, at dentur verður lagdur á trygd á netinum, og at tey ungu verða upplærd í teimum fyrimunum og vansum, ið fylgja við tí at ferðast á netinum.
Nema er ein av høvuðsstuðlunum hjá eSport.fo, har ið vit nýta høvið at lýsa við boðskapum um góðan atburð á netinum og eru samstundis við til at skapa góðar og tryggar karmar fyri game'arar í føroyum.

Síðan 2022 hevur Nema havt gott samstarv við GameJam, ið hevur til endamáls at skapa áhuga í framleiðslu av spølum. Hendan vinnan er sera stór í heimshøpi, og við hesum er Nema við til at skapa áhuga og stimbra eina komandi vinnu.

## Nema

Fyritreytirnar fyri, at Nema kann hava eina jaliga ávirkan á nærumhvørvið og starvfólkini, er ein sunnur rakstur og úrslit.

Í 2019 legði Nema saman við Hey. Hetta hevði við sær, at vinningur, skattur, skuld og annað hækkaði munandi. Tó sæst, at nevnd og leiðsla saman við dugnaligu starvsfólkunum hava megnað at styrkt felagið munandi eftir samanleggingina.

Góða gongdin hevur somuleiðis givið Nema møguleikan at leggja enn meira orku og tilfeingi í nærumhvørvið og náttúruumhvørvið.




| Bruttovinningur |
| --- |
| **46.774 mio.** |

| Starvsfólkakostnaður |
| --- |
| **33.123 mio.** |

| EBITDA |
| --- |
| **13.651 mio.** |



# 2. Náttúruumhvørvið

Tað er okkara ábyrgd at tryggja okkum og komandi ættarliðum eitt gott og stimbrandi umhvørvi. Við ágrýtni og greiðum málum hevur Nema arbeitt umhvørvið inn í gerandisdagin og gjørt mannagongdir, sum skulu tryggja góðan og sunnan umhvørvisligan atburð.

## Frá útláti til varandi orku

Í 2024 hevur Nema tikið stór stig fyri at minka um sítt umhvørvisliga fótspor. Útlátið av CO2e í vavi 1, sum fevnir um beinleiðis útlát frá egnu oljufýring og bilaflotanum, var 30,8 tons í 2024. Hetta er ein greið lækking samanborið við 33,2 tons í 2023 og 38,5 tons í 2022: Gongdin vísir, at málið um at koma niður á 19 tons í 2028 er realistiskt.

Eisini er vav 2-útlátið, sum fevnir um óbeinleiðis útlát frá keyptari orku, minkað nógv. Í 2024 var tað 40,5 tons, samanborið við 88,8 tons í 2023. Málið fyri 2028 var sett til 45 tons, og hetta málið er tí longu rokkið.

Orkunýtslan er somuleiðis minkað munandi. Í 2024 var elorkunýtslan 75 MWh, ið er ein sera stór lækking frá 208 MWh í 2023. Samlaða orkunýtslan er minkað niður helvt í 2024 samanborið við árið frammanundan. Hesi úrslit koma serliga av, at bensin- og dieselakfør eru skift út við elakfør, og at orkunýtslan annars er skerd við orkusparandi tiltøkum.

Parturin av varandi orku í orkunýtsluni var 24% í 2024, sum er eitt lítið stig niður frá 32,7% í 2023. Hóast hetta, so er málið at røkka minst 38% innan 2028, og við støðugari elektrifisering verður hetta mett at vera møguligt.

Tá tað kemur til burturkast, eru greið tekin um framgongd. Pappír og papp er minkað meira enn helvtina samanborið við 2023. Restburturkast minkaði eisini við 78% í 2024, og tí er málið fyri 2028 eisini rokkið. Elektroniskt burturkast minkaði 55% í 2024 samanborið við 2023.
Nema leggur dent á, at tað er týdningarmikið at taka ímóti og burturbeina elektroniska útgerð, tí hetta tryggjar rætta handfaring.



# ESG lyklatøl

## Umhvørvi

| Lyklatøl | Eind | Mál 2028 | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|
| CO2e vavi 1 | Tons | ≤19 | 30.8 | 33.2 | 38.5 |
| CO2e vavi 2 | Tons | ≤45 | 40.5 | 88.8 | 80.3 |
| Elorkunýtlsa | MWt | ≤85 | 75 | 208 | 196 |
| Samlað orkunýtsla | GJ | ≤780 | 864 | 1.377 | 1.374 |
| Varandi orka | % | ≤40 | 32 | 78 | 30 |
| Burturkast, pappír/papp | m3 | ≥38 | 24.0 | 32.7 | 31.2 |
| Elektronikkur | kg | | 262 | 471 | 71 |
| Restburturkast | m3 | ≤120 | 98 | 125 | 161 |




## Burturbeining og endurnýtsla

Elektroniskt burturkast er ein alsamt vaksandi altjóða trupulleiki, og sum ein av Føroya størstu veitarum av alskyns KT-útgerð kenna vit tað sum okkara ábyrgd at tryggja, at so nógv av hesum verður endurnýtt og burturbeint á rættan hátt sum gjørligt.

Røtt burturbeining av elektronikki er týdningarmikil liður í at verja bæði umhvørvið og náttúrutilfeingið – og stuðlar einum burðardyggum samfelagi.

Í samband við Umhvørvisvikuna í Vestmanna kommunu løgdu vit dent á burturbeining av elektronikki. Tí høvdu vit ein bás til elektroniskt burturkast á ruskplássinum í Vestmanna. Við okkum høvdu vit ein knúsara til harðdiskar, ið tryggjar, at dátur og elektronikkur verða burturbeind rætt. Hetta er eitt afturvendandi tiltak í Vestmanna kommunu.

Orsakað av góðu undirtøkuni í Vestmanna hava vit gjørt av at geva okkara kundum sama møguleika. Hvønn dag ber til at koma inn í Nema-handilin í Havn fyri at burturbeina elektronikk á rættan hátt, og ein dag um mánaðin er møguligt at fáa knúst harðdiskin á staðnum. Harðdiskknúsarin tryggjar, at allar dátur verða oyðilagdar.

Eisini samstarvar Nema við Foxway, sum er ein altjóða fyritøka, ið er serkøn viðvíkjandi burturbeining og at endurnýggja teldur, telefonir og annað. Umframt at burturbeina og endurnýggja vørur tryggjar hetta samstarvið eisini, at allar dátur verða burturbeindar á rættan og tryggan hátt. Hetta er eitt samstarv, vit bjóða okkara vinnukundum at fáa ágóðan av, tá ið teir skulu burturbeina gomul tól. Harafturat bjóða vit 3 ára garanti upp á allar vørur, ið vit selja til vinnuna.

Fyri nøkrum árum síðan var Endurkeyp Grunnurin settur á stovn. Endamálið við grunninum er at geva eitt fíggjarligt ískoyti til føroyskar umhvørvisverkætlanir, og Nema hevur latið nærum 90.000 krónur til ymiskar verkætlanir. Til tess at fíggja Endurkeyp Grunnin bleiv millum annað ein kostnaður lagdur á Nema-posarnar, og allar inntøkurnar av hesum fara í grunnin. Kostnaðurin á posunum er eisini við til at minka um nýtsluna av posum og geva teimum eitt virði.

Innanhýsis í Nema hava vit eisini sett sjóneykuna á rusk, og á kontórinum skilja vit millum restburturkast, papp, pappír, plast, elektronikk og pant. Javnan verður okkara gerandisdagur endurskoðaður, tá ið tað snýr seg um burturkast, sundurskiljing og plastnýtslu, papp, pappír og annað.

Les meira um Nema Endurkeypgávuna her:
https://www.nema.fo/um-nema/grona-gavubraevid/



## Ferðsla og flutningur

Nema er virkið kring landið, tá ið tað snýr seg um viðskiftafólk, farnet, breiðband og ymisku deildirnar. Til tess at minka um útlátið nýta vit framkomnu tøkniloysnina Knatt, ið ger tað lættari at samskipa koyringina og vísir okkum á koyritørvin. Við hesum síggja vit skjótt, um tørvur er fyri einum bili afturat, ella um ein skal takast úr nýtslu.

Umframt nýggjastu tøknina er elbilurin vorðin ein partur av okkara bilflota, og bensin- og dieselbilarnir verða skiftir út so hvørt við el. Í dag eru umleið 47% av øllum bilum hjá Nema elriknir. Eingin bensin- ella dieselbilur er keyptur, síðan málini vóru sett í 2022. Allir bilar, ið eru skiftir út seinastu árini, eru skiftir út við elbilar.

Harafturat hevur Nema gjørt íløgu í elløðistøðum uttan fyri kontórið á Smyrilsvegi í Havn. Hetta ger tað meira ómakaleyst hjá okkara starvsfólkum at løða bæði persónligu bilarnar og arbeiðsbilarnar.

# Eitt felags farnet

Umframt fyrimunirnar fyri alt føroyska fólkið hevur útbyggingin av 5G-netinum eisini umhvørvisligar ágóðar.

Eitt felags farnet hevur ikki eins nógva og sjónliga útgerð sum tvey farnet.

Við einum felags farneti er sum heild minni flutningur av tøkni, starvsfólki og kaðalarbeiði.

Munadyggari útgerð, ið avrikar meira við minni streymnýtslu, av tí at sendistøðirnar einans eru tendraðar, tá ið ferðsla er á netinum.

Umframt hetta er gamla sendinetið, ið var tikið niður í 2024, sent av landinum, so tað kann endurnýtast á øðrum marknaðum.





## Góðkendar veitarar og grønar loysnir

Vit seta høg krøv til okkara veitarar og fara eftir dygdini. Alsamt fleiri av okkara veitarum hava í dag umhvørvisstempul av ymiskum slag og kunnu veita trygd fyri, at teirra undirveitarar framleiða eftir ávísum umhvørviskrøvum.

Nema er høvuðsveitari av Dell í Føroyum og ein av høvuðsraðfestingunum hjá Dell er ringrásarbúskapur. Málið er, at fyri hvørja teldueind, sum verður seld, skal ein tilsvarandi nøgd av útgerð verða endurnýtt ella endurvunnin.

Nakrir av okkara størstu veitarum eru Dell, Microsoft, Apple og Canon. Tað, ið allar fyritøkurnar hava í felag, er, at tær eru ISO 14001-góðkendar, hava vørur við energy star orkumerkinum og Epeat, hava endurnýtsluátøk, brúka umhvørvisvinarligt tilfar og hava ESG-frágreiðingar. Harumframt seta fyritøkurnar sær mál um at minka um $CO_2$-fótasporið og fremja burðardygga nýskapan.

Í handlum okkara selja vit eisini endurnýttar vørur frá veitarinum EET. Allar vørurnar verða testaðar og góðkendar, áðrenn tær verða seldar til kundan. Við at bjóða kundunum endurnýttar vørur hjálpa vit ikki bara kundanum við at spara pening, men hugsa eisini um umhvørvið, tí hetta minkar um elektroniskt burturkast og ger livitíðina hjá vøruni longur.
Haraftur verður dentur lagdur á, at vit í størsta mun keypa vøru, ið ikki hevur óneyðugt pakkitilfar.

Á kontórum okkara nýta vit kopipappír, ið hevur Eco Lable, Emas og FSC-góðkenningar. Umframt hetta nýta vit Recycled Classic kopipappír, ið eisini hevur fleiri umhvørvisgóðkenningar. Fyri góðum 6 árum síðan valdu vit at framleiða Nemakalendaran úr pappíri, sum hevur svanamerkið.




## Komandi árini

Nema vil gjarna gera mun. Vit vilja skapa framburð og menning á okkara øki og harvið eisini umhvørvi, ið vit virka í. Nema hevur tilvitað arbeitt við ymsum átøkum við íblástri úr ISO 26000, og langtíðarmálini eru hesi:

- Orkunýtsla og útlát skulu lækka 50% áðrenn 2030.
- Øll akfør skulu leggjast um til varandi orku áðrenn 2028.
- Øll okkara langtíðarleigumál skulu leggjast um til varandi orku áðrenn 2030.
- Í 2028 skulu ≥25% av nevndini mannast av kvinnum.
- Í 2028 skulu ≥35% av starvsfólkunum í Nema vera kvinnur.

Nema fer framhaldandi at hava sjóneykuna á okkara ávirkan á náttúru og samfelag. Vit áleggja okkum ta ábygrd at økja um okkara samfelagstilvit við at lýsa og vera við til at loysa komandi avbjóðingar.

## Útgangur

Sum ein av Føroya størstu KT- og fjarskiftisfyritøkunum hevur Nema eina greiða ábyrgd í samfelagnum og nærumhvørvinum. Við støði í heimsmálunum hjá ST arbeiðir fyritøkan miðvíst við at menna burðardyggar loysnir, styrkja nettrygdina, skapa góðar karmar fyri okkara starvsfólk og tryggja eina dygdargóða tænastu til okkara viðskiftafólk.

Vit leggja dent á at vera ein virkin og ábyrgdarfullur partur av nærumhvørvinum – við stuðli til ítrótt, vælgerandi endamál, gransking og ungdóm, og við at skapa trivnað og menning hjá starvsfólkunum. Samstundis hava vit sett greið mál fyri at minka um okkara umhvørvisfótaspor, millum annað við at leggja allan bilflotan um til el, økja um endurnýtslu og stuðla burðardyggum verkætlanum gjøgnum Endurkeyp Grunnin.

Við hesum átøkum og langtíðarsettum málum vil Nema vera ein álítandi og framsøkin fyritøka, sum er við til at skapa burðardyggan framburð – bæði fyri føroyska samfelagið og komandi ættarliðið.

nema